# Luttøkukrøv til WRICH/HM

Fyri at luttaka í WRICH/HM í døgunum 25. og 26. februar 2002 skal ein hava kvalifiserað seg til luttøku.

Tveir møguleikar eru fyri at kvalifisera seg til luttøku:

1. Luttaka í einari góðkendari undankapping, sí her (sanctioned events): https://worldrowing.com/event/2022-world-rowing-indoor-championships
2. Rógva og upptaka ein individuellan róður. Síðsta freist at uppload tíð og video er 2. februar kl. 23:59 UTC GG! hædd skal takast fyri, at tíðin at fáa góðkenning kann vera nakrar dagar.

*Luttakari skal og má lesa og seta seg inn í leiðreglurnar á worldrowing.com.*

**Niðanfyri eru í høvuðsheitum krøvini til individuella kvalifikatión:**

1. Upprætta profil á worldrowing.com Her krevst navn, nationalitetur, føðidato, mynd av passi og anlitsmynd av luttakara. Harumframt navn, teldupostadressa og telefonnummar frá foreldri ella verja, um luttakarin er undir 18 ár (luttekur í U19)
2. Vel hvørja kapping/ar ein ynskir at luttaka í. Gjald.
3. Legg eina videoupptøku inn fyri hvønn róður, luttikið verður í. Videoupptøka skal týðiliga vera/vísa:
    a. Einkult/alt-í-einum upptøka
    b. Upptøka skal innihalda:
        i. Kunning um luttakara, har anlit er týðiliga víst uttan nakra forðing.
        ii. nærmynd av skerminum, áðrenn byrjað verður at rógva
        iii. týðiliga/klára mynd av luttakara og rógvimaskinu gjøgnum allan róðurin.
        iv. nærmynd av skerminum eftir róðurin. Skermurin skal týðiliga vísa røttu eindirnar fyri róðurin.

    GG! Tað ber til at dagføra tíðina, um ein ger fleiri royndir at kvalifisera seg.
4. Score Verification/váttan fyri róður
    a. áðrenn róð verður, tryggja at dagfesting og tíð á skerminum er røtt sett, og at skermurin er dagførdur. Hetta er krav fyri at váttanin verður góðkend.
    b. Ger eitt av fylgjandi
        i. Tøppa tað 16-sifraðu Verificatións koduna á heimasíðuna
        ii. Uploada róðurin á Concept2 Logbook og bind tað til entry portalin
5. Lættvekts váttan (bert tey, ið luttaka í lættvekt kapping)
    a. Innviging er millum 2 og 1 tíma undan kapping og skal takast upp á video, ið vísur:
        i. Luttakara í fullari hædd og týðiligt anlit, meðan viðkomandi traðkar upp á eina vekt í kappingarklæðum.
        ii. Vektin skal vísa vekt í kilo við 0,1 kg. vísing.
        iii. Prógv fyri dag og tíð, umframt verifikatiónskodu. Kann gerast við at hava eina telefon ella teldu við síðunar av, sum týðuliga vísir hetta.